## Danir ella russar eiga pólin

Bretskir granskarar, sum hava kannað havbotnin kring Norðpólin, siga, at spurningurin um ræðisrættin á leiðini er eitt mál millum Danmark og Russland. Granskararnir hava teknað eitt kort, sum vísir, at USA og Kanada kunnu krevja ávís økir, men at økið við sjálvan Norðpólin er annaðhvørt danskt ella russiskt. Spurningurin um ræðisrættin yvir póløkinum hevur stóran týdning, tí vísindafólk halda, at umleið 90 milliardir tunnur av olju kunnu vera undir havbotninum í póløkinum.



*Danir og russar skulu samráðast um póløkið, siga bretskir granskarar*
*Kort: TV2*

# Verjuskip skal boða evangeliið

**Sjóverjuskipið Agdlek eitur nú Juvel 2 og er farið til Grønlands sum trúboðaraskip**



*Juvel 2 fer av Klaksvík á fyrstu trúboðaraferðina til Grønlands*

**TRÚBOÐAN**

*Árni Joensen:*
*arni@sosialurin.fo*
*Myndir: Høgni Thomsen*

Gamla sjóverjuskipið Agdlek er aftur í Grønlandi. Men nógv er broytt. Tann grái sjóverjuliturin er skiftur til hvítt, manningin gongur ikki í búna longur, málið umborð er ikki danskt, men føroyskt, og so hevur skipið eisini broytt navn og eitur nú Juvel 2.

Herumframt er skipið komið aftur til Grønlands í heilt øðrum ørindum enn fyrr.

Herfyri keypti Brøðrasamkoman Agdlek frá donsku sjóverjuni og gav tí navnið Juvel 2. Síðani er skipið umbygt, so tað kann brúkast sum trúboðaraskip. Brøðrasamkoman hevur havt trúboðaraskip í grønlandi í fleiri ár við millum annað Beintu og seinast Juvel, men nú var tíðin komin til at fáa annað skip ístaðin fyri, sigur gøtumaðurin Arne Hansen, sum er skipari á Juvel 2 hendan fyrsta túrin í Grønlandi. Sjálvur hevur hann ført nøkur av teimum størstu føroysku fiskiskipunum, men hesaferð skal hann á nýggjar leiðir.



*Arne Hansen í Norðragøtu er skipari á Juvel 2*

- Vit skulu vitja trúgvandi í bygdunum í Vesturgrønlandi og boða evangeliið. Føroyingar hava verið í Grønlandi í mong ár og hava góð viðurskifti við grønlendingar, so vit gleða okkum til hetta arbeiðið, sigur Arne Hansen.

Upprunaliga var ætlanin at fara til Grønlands við Juvel 2 tíðliga í summar, men ymiskt dró út, so skipið er seinkað í ár. Hesaferð skal skipið fyrst norður til Jakobshavn, og haðani skal skipið sigla suðureftir og vitja fleiri av bygdunum allan vegin suður ímóti Hvarvinum. Ætlandi kemur Juvel 2 aftur til Føroya í heyst, og næsta ár er so ætlanin at fara fyrr á árinum og at fara væl longri norður.

Tá Juvel 2 fór úr Føroyum herfyri, vóru níggju mans við, og í Grønlandi komu nøkur fólk umborð afturat, áðrenn leiðin varð løgd norðureftir.



*Manningin fekk nøkur góð irð við sær, áðrenn loyst var. Frá vinstru Zacharis Zachariassen, Steinbjørn Jacobsen og Óli Steinberg*

